# Sangleikur um Kúlla Knút

**Leygardagin verður frumsýning av barna- og ungdómssangleikinum Kúlla Knút, sum Havnar Sjónleikarfelag stendur fyri. Kúlla Knút hevur sín uppruna í danska Bølle Bob, men er nú umsettur og umskrivaður, so føroysk børn skulu kenna seg aftur í honum**



*13 ára gamli Philip Reinert Ovenberg úr Hoyvík spælir Kúlla Knút í sangleikinum av sama navni, sum verður frumsýndur leygardagin*
*Mynd: Finnur Justinussen*

SJÓNLEIKUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Fyri tjúgu árum »uppfann« danin Gunnar Geertsen søguna um Bølle Bob, sum síðan er vorðin fólkaogn í Danmark. Leikurin hevur verið á palli óteljandi ferðir síðan og millum annað er ein sjónvarpsrøð gjørd um Bølle Bob. Eisini tónleikurin, sum er ein samantvinnaður partur av søguni um Bølle Bob, er vorðin væl umtøktur í Danmark, seldar eru umleið 350.000 plátur og fløgur, og millum løgini finnast eisini fleiri landaplágur.

Og tað var eitt av hesum løgunum við Bølle Bob, sum fekk Elin á Rógvi at hugsa um, hvørt tað ikki hevði verið eitt gott hugskot at fingið leikin umsettan og umskrivaðan, so eisini føroysk børn (í øllum aldri) kundu fáa gleði av søguni.

- Tað var eitt hvørt í tónleikinum við Bølle Bob, sum fangaði meg. Eg hevði longu tá ætlanir um at leikstjóra ein sjónleik fyri børn, men eg valdi tó at lesa fleiri aðrar leikir, áðrenn eg gjørdi av at tað skuldi vera Bølle Bob, greiðir Elin á Rógvi frá. Hon hevur sjálv leikstjórnað leikinum, meðan Herleif Hammer er framleiðslustjóri.

Tað var eitt ivamál um Bølle Bob skuldi sleppa at varðveita sítt danska navn, men fólkini aftan fyri leikin valdu tó, at í Føroyum skal Bølle Bob eita Kúlla Knút.

### Stuttligur leikur

Søgan í sangleikinum um Kúlla Knút fer fram í eini føroyskari bygd, har ein standmynd skal avdúkast. Av einhvørjari orsøk verður standmyndin stolin, men vit kunnu tó longu avdúka, at hon kemur afturíaftur, áðrenn leikurin er av. Fleiri stuttligar søgur og stuttligir persónar eru í leikinum, millum annað handilsmaðurin Blom, sum selir børnunum bomm og ymiskt annað.

Elin á Rógvi sigur, at leikurin fyrst og fremst er stuttligur, men sjálvandi er eisini ein moralur aftanfyri, leggur hon afturat. Eisini er tónleikur og sangur ein berandi partur av leikinum, og millum annað verða tíggju sangir framførdir, teir umleið tveir tímarnar, leikurin varir.

### 20 leikarar

Tilsamans 20 leikarar, 15 børn og fimm vaksin, úr Havn, Hoyvík, Kollafirði og Nólsoy, eru við í leikinum. Elin á Rógvi hevur sjálv valt børnini út til leikin, eftir at tey hava verið til »casting« í Sjónleikarahúsinum, har tey millum annað skuldu vísa, at tey dugdu at syngja, dansa, spæla sjónleik og so skuldu tey eisini vera til reiðar at nýta stóran part av síni frítíð til venjingar.

Venjingarnar til leikin byrjaðu um hálvan august, og liggur nógv arbeiði aftanfyri, nú tey leygardagin hava frumsýning av leikinum. Av tí at talan er um ein sangleik, hevur avbjóðingin ligið í at fáa tónleikin at passa til sjónleikin.

Sangirnir eru allir umsettir til føroyskt, meðan løgini eru tey somu sum í donsku upprunaútgávuni. Av tí at upphavsrætturin til sangirnar og tónleikin við Bølle Bob er spjaddur á fleiri hendur, rokna tey í Havnar Sjónleikarfelag ikki við, at nøkur fløga fer at spyrjast burturúr. Men tey hava tó fingið loyvi til at spæla ein sang um Kúlla Knút inn av nýggjum, og hesin verður væntandi at hoyra í útvarpinum í næstum.

### Frumsýning leygardagin

Leygardagin klokkan 19 verður frumsýning í Sjónleikarhúsinum í Havn av sangleikinum um Kúlla Knút. Av tí at pallurin er stórur, og leikararnir eru ikki færri enn 20 í tali, vænta tey ikki at farið verður at ferðast kring landið við leikinum. Fyribils er ætlanin at spæla sangleikin um Kúlla Knút 14 ferðir, men annars so leingi, sum áhugi er fyri leikinum.

# Postverkið má liva í óvissuni

**- Landsstýrið er samt um at raðfesta eldraøkið hægst næsta ár, og tað merkir millum annað, at eingir pengar eru til Postverkið. Hetta visti Bjarni Djurholm eisini av, men tá hann so allíkavæl ætlaði at játta Postverkinum átta milliónir á fíggjarlógini, so noyddist Fíggjarmálaráðið at strika pengarnar. Tað sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, nú tað vísir seg, at átta milliónir mangla í fíggjarætlanini hjá hjá Postverkinum næsta ár. Karsten Hansen vísir á, at arbeitt verður við at fremja broytingar innan Postverkið, so stovnurin gerst bíligari at reka. Broytingarnar skulu fremjast í hesum árinum**




FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Postverk Føroya skal umskipast, so ella so. Og broytingarnar skulu stingast út í kortið og fremjast, longu í ár. Tað er greitt, eftir at játtanin til stovnin er strikað í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár. Spurningurin er so, hvørt Postverkið skal umskipast til alment partafelag, ella onkur onnur loysn skal finnast. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er av tí áskoðan, at rættast er at umskipa Postverkið til alment partafelag, og landsstýrismaðurin metir, at henda loysn fer at gera Postverkið bíligari at reka. Í øllum føri tær átta milliónirnar, sum í dag mangla í roknistykkinum hjá postverksstjóranum til fíggjarætlan fyri næsta ár. Úr Vinnumálaráðnum hevði Bergur í Garði, stjóri á Postverkinum, annars fingið vissu fyri, at hann fór at fáa átta milliónir úr landskassanum næsta ár, men henda játtan er síðan skorin burtur. Bergur í Garði vísir á, at av hesum átta milliónunum skuldu millum tríggjar og fýra milliónir nýtast til rakstur, meðan restin skuldi nýtast til íløgur. Hann leggur afturat, at ikki ber til at spara allar íløgurnar burtur, og tí verður helst neyðugt at finna enn størri part av pengunum av rakstrinum, harav lønir eru 80 prosent.

Í Sosialinum í gjár segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum eisini varir av Postverkinum, at hann hevði sett pengarnar av til Postverkið, fyri á tann hátt at tryggja grundarlagið undir stovninum næsta ár. Men hann legði afturat, at fór tað at eydnast at umskipa Postverkið til alment partafelag næsta ár, so fór ikki at verða neyðugt við játtanini. Tí var hann skelkaður, tá hann, eftir at fíggjarlógaruppskotið var farið til prentingar, fekk at vita, at Fíggjarmálaráðið hevði strikað játtanina til Postverkið.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, er ikki heilt samdur við tulkingini hjá Bjarna Djurholm av gongdini í málinum. Karsten Hansen vísir á, at tað á landsstýrisfundi, væl áðrenn fíggjarlógin fór til prentingar, var semja um at raðfesta onnur øki, millum annað eldraøkið, hægri, og at eingir pengar tí vóru til Postverkið næsta ár.

- Tað var semja í samgonguni um, at onnur øki í samfelagnum skulu raðfestast hægri, og at eingir pengar tí vóru til Postverkið. Men tá eg so fái uppskotið til játtanir til málsøkið vinnumál frá Bjarna Djurholm, eru átta milliónir kortini settar av til Postverkið. Trupulleikin er bara, at tá var longu semja um at nýta pengarnar til onnur øki, og tað ber jú ikki til at nýta somu pengar tvær ferðir. Tí valdi eg at strika hesa játtan, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

### Postverkið skal umskipast

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, vísir á, at fæst ikki politisk undirtøka fyri at umskipa Postverkið til alment partafelag, so kemur stovnurin í álvarsligar trupulleikar, tí so mangla átta milliónir í fíggjarætlanini hjá stovninum. Hann vil tí hava landsstýrismannin í fíggjarmálum at veita vissu fyri, at játtanin til Postverkið kemur aftur á fíggjarlógina, fæst ikki politiskur meiriluti fyri at umskipa stovnin.

Karsten Hansen sigur, at málið snýr seg ikki um, hvørt hann skal veita Bjarna Djurholm vissu fyri nøkrum sum helst.

- Eg havi fingið boð um, at man hevur ætlanir um at finna eina endaliga loysn fyri Postverkið, og at henda loysn verður funnin í hesum árinum. Tað hevur alla tíðina ligið í kortunum, sigur Karsten Hansen. Hann kann tí heldur ikki veita postverksstjóranum nakra vissu fyri, at játtanin til stovnin kemur aftur á fíggjarlógina, eydnast tað ikki politiska myndugleikanum at semjast um framtíðina hjá Postverki Føroya.

Karsten Hansen hevur lítlan hug at gera viðmerkingar til, hvørt hann og restina av Tjóðveldisflokkinum taka undir við at umskipa Postverkið til alment partafelag.

- At umskipa Postverkið til alment partafelag er ein møguleiki av fleiri, sigur Karsten Hansen og leggur afturat, at enn væntar nakað í, áðrenn ein loysn er funnin fyri Postverkið. Hann ivast tó ikki í, at ein loysn verður funnin fyri Postverkið í hesum árinum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, segði av tingsins røðarapalli hósdagin, at í samband við at umskipa Postverk Føroya til alment partafelag, verður lagt upp til, at Postverkið millum annað skal selja burturav sínum aktivum, t.d. bygningum, fyri millum 30 og 40 milliónir krónur.

# hygg & hoyr

**Frá fríggjadegi 11. oktober til hósdagin 17. oktober**

## ! – Happing 5:12

*Næmingar úr 6. flokki á skúlanum á Giljanesi práta um happing, og hvussu man kann steðga happing. Vit práta eisini við ein persón, sum veit nógv um happing. Næmingarnir sleppa eisini at hitta tann persónin, sum tey helst vilja hitta. Gita hvør tað verður.*




## Det bli'r ikke bedre




*Ein rørandi og romantiskur skemtifilmur, sum bæði Helen Hunt og Jack Nicholson, vunnu ein Oscar fyri. Melvin (Jack Nicholson) er tann løgnasti maðurin tú kanst hugsað tær. Hann arbeiðir heima í íbúð síni á Manhattan, har hann roynir at fullføra arbeiði av eini skaldsøgu. Restina av tíðini brúkar hann upp á, at irriterast inn á onnur menniskju. Hann velur, av tilvild, nøkur offur. Hansara homoseksuelli granni, Simon, fær serliga nógv stríð av Melvin, sum hevur sínar føstu ætlanir, sum hann fylgir í allar endar og kantar. Hann byrjar millum annað dagin við døgurða á eini lokalari kafe, har hann hevur fast borð, og bestikk við í lummanum. Her hevur hann eisini havt samanbrestir við øll tey arbeiðandi, øll uttan Carol (Helen Hunt). Hon er ein hart arbeiðandi mamma, sum hevur ein son, sum er plágaður av astma. Carol hevur nóg mikið at stríðast við í sínum egna lívið, og letur seg ikki órógva av einari ella tveimum sarkastiskum viðmerkingum. Saman við Carol verður Melvin noyddur at seta seg inn í lívið hjá øðrum og kenslurnar hjá teimum. Hetta er ein ræðandi uppliving fyri hann, sum ikki dugir so væl sosialt, og heilt einkult ikki veit, hvussu hann skal uppføra seg.*

## Taxi - út í verð




## Skúlagáttin




## Undan væðingini - smuglarin




## Gesturin

